## Føroya Handilsskúli søkir eftir

# LÆRARUM

**Treytað av ætlaðum virksemi søkir Føroya Handilsskúli eftir lærarum til HH og FHS í Tórshavn frá 1. august 2011. Talan er antin um tíðaravmarkað starv skúlaárið 2011/2012 ella um fast starv, um umsøkjari hevur útbúgving, sum hóskar til tørv skúlans.**

**Setanarkor til fast starv: Tvey tey fyrstu árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum verða settir í fast starv, hava skyldu at undirvísa í teimum lærugreinum, teir hava førleika til, og mugu vera til reiðar at fara undir námsfrøðilga útbúgving.**

**Løn: Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið, ella eftir avtalu.**

---

**Lærarar til gymnasialu yrkisútbúgvingina (HH):**
Søkt verður eftir lærarum til hesar lærugreinir: Altjóða búskap B, Danskt A, Føroyskt A, Heimspeki C, Innovatión C, Samfelagslæru C, Samtíðarsøgu B, Sálarfrøði C, Støddfrøði A, B og C, Sølubúskap A og B, Vinnulívsrætt C og Virkisbúskap B.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella onnur hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Hon skal vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi 16. mai 2011**. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Olav Absalonsen á telefon 317177, teldupostur: oa@hsh.fo

**Lærarar til yrkisútbúgvingina (FHS):**
Søkt verður eftir lærarum til hesar lærugreinir: Føroyskt C, Innovatión C, Marknaðarførslu C, Samfelagslæru/Fiskivinnu C, Støddfrøði C, Virkisbúskap C, Visuella marknaðarførslu C og skúlaskeið fyri lærlingar.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella onnur hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Hon skal vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi 16. mai 2011**. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Sonju Oyrabø Petersen á telefon 317177, teldupostur: sp@hsh.fo.

---

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 400 næmingar á gymnasialu yrkisútbúgvingunum (3-ára HH og 2-ára HH), og umleið 150 á yrkisútbúgvingini innan Fyrisiting, Handil og Skrivstovu (FHS), sum tekur eitt ár, og gevur atgongd til lærlingasútbúgving og til 2-ára HH, har FHS telur sum tað fyrsta árið av trimum. Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast umleið 35 lærarar og á Kambsdali umleið 30. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri skrivstovulærlinga- og handilslærlingaútbúgving og fyri hægri útbúgvingum sum HD, teldustøðingaútbúgving og akademiútbúgving.